




## Sjey skip í Saltangará

Heykur og Falkur hava gjørt ein roktúr á upsaveiði. Hetta man vera besti túrur hjá partrolarapari í longri tíð

**Vilmund Jacobsen**

Hesa vikuna hevur landingarmiðstøðin Kongshavn landað sjey skip.

Í gjár landaðu Heykur og Falkur 440.000 pund av upsa. Hetta var ein rættiliga góður túrur hjá teimum. Skipini vóru eisini inni seinasta fríggjadag við 260.000 pundum av upsa.

Polarhav og Stjørnan, sum eru á gulllaksaveiði, landaðu mikudagin sløk 250.000 pund.

Í gjár vóru eisini Jaspis og Ametyst inni. Teir brutu túrin av vegna veður og høvdu 110.000 pund av upsa.

Fyrst í hesi vikuni landaði Eysturbúgvin stívliga 260.000 pund av gulllaksi. Eysturbúgvin partrolar saman við Vesturbúgvanum, sum landaði umleið somu nøgd av gulllaksi til Faroe Pelagic í Kollafirði.

Á landingarmiðstøðini Kongshavn vóna tey, at góði túrurin hjá Heyki og Falki hesaferð er ein ábending um, at upsaveiðan fer at batna.

Upsaveiðan hjá partrolarunum hevur annars verið rættiliga vánalig í longri tíð, men vónir hava verið um, at hon fer at batna so hvørt, sum tað líður út á heystið.

- Nú er so at vóna, at hesin túrurin kanska avspeglar okkurt, sum er í væntu, siga tey á landingarmiðstøðini Kongshavn í Saltangará.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Turbulensur




Veika liðið í nýggju trygdarskipanini er vindmátarin á Skeiðini

## Í MORGIN




Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrtðingi, seinnapartin minni vindur av norði. Sólglottar, men eisini okkurt ælið og hitin millum 4 og 7 stig.

## SUNNUDAGIN




Lot til andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 5 og 8 stig.

## MÁNADAGIN




Fyrrapartin lot av ymsum ættum, turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk av landsynningi og regn. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og landnyrðingi og sólglottar, men eisini ælingur og hitin millum 6 og 10 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 985 hPa. við Bergen fer spakuliga í landsynning og grynnist. Eitt hátrýst, 1026 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum stendur mestsum í stað.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið við Oslo fer eystureftir og grynnist. Hátrýstið yvir Grønlandsfjørðinum stendur mestsum í stað og ein hátrýstryggur haðani verður yvir Føroyum sunnuddagin.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 94 mm

### Hitalagið kring knøttin



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

8. sept — Mánin næstur jørðini
15. sept — Fyrra kvarter
21. sept — Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17. sept | 03:16 | 15:39 | 02:16 | 14:39 | 02:31 | 14:54 | 05:16 | 17:39 | 06:16 | 18:39 | 01:31 | 13:54 | 00:31 | 12:54 | 03:31 | 15:54 | 04:31 | 16:54 | 03:01 | 15:24 | 04:16 | 16:39 |
| 18. sept | 04:03 | 16:24 | 03:03 | 15:24 | 03:18 | 15:39 | 06:03 | 18:24 | 07:03 | 19:24 | 02:18 | 14:39 | 01:18 | 13:39 | 04:18 | 16:39 | 05:18 | 17:39 | 03:48 | 16:09 | 05:03 | 17:24 |
| 19. sept | 04:46 | 17:07 | 03:46 | 16:07 | 04:01 | 16:22 | 06:46 | 19:07 | 07:46 | 20:07 | 03:01 | 15:22 | 02:01 | 14:22 | 05:01 | 17:22 | 06:01 | 18:22 | 04:31 | 16:52 | 05:46 | 18:07 |
| 20. sept | 05:28 | 17:47 | 04:28 | 16:47 | 04:43 | 17:02 | 07:28 | 19:47 | 08:28 | 20:47 | 03:43 | 16:02 | 02:43 | 15:02 | 05:43 | 18:02 | 06:43 | 19:02 | 05:13 | 17:32 | 06:28 | 18:47 |
| 21. sept | 06:06 | 18:23 | 05:06 | 17:23 | 05:21 | 17:38 | 08:06 | 20:23 | 09:06 | 21:23 | 04:21 | 16:38 | 03:21 | 15:38 | 06:21 | 18:38 | 07:21 | 19:38 | 05:51 | 18:08 | 07:06 | 19:23 |